


Føroyski Rúni M. Hansen, stjóri í Statoil Exploration í Føroyum og leiðari fyri arktisku eindini hjá Statoil her saman við Helge Lund, forstjóra og Tim Dodson, ovasta fyri altjóða leiting. Myndatøka Jan Müller/oljan.fo

# Statoil nógv størst í Norðurlondum

Deil:

**Jan Müller**

12.07.2014 - 17:37

Oljan.fo

**Við einum árligum umsetningi uppá 637 mia. kr. er Statoil so avgjørt størsta fyritøkan í Norðurlondum. Á einum øðrum plássi kemur danska A.P. Møller Mærsk, meðan svenska Volvo er á einum triðja plássi.**

**Hetta skrivar blaðið Kapital, sum hvørt ár ger yvirlit yvir tey størstu feløgini í Norra og í Norðurlondum.**

So mikið stórt er Statoil at leggja vit Mærsk og Volvo saman, so røkka tey ikki Statoil. Og so mikið stórt er Statoil í Norra, at tað er størri enn tær 9 størstu fyritøkurnar í landinum tilsamans.

Hóast Norra eigur størsta felagið í Norðurlondum, so liggur Svøríki greitt á odda, tá tað snýr seg um at hava flestu av størstu fyritøkunum í Norðurlondum. Ikki færri enn 14 av teimum størstu fyritøkunum eru svenskar. Danir hava sjey av plássunum, meðan finnar hava seks og norðmenn tríggjar av teimum størstu fyritøkunum í Norðurlondum skrivar Kapital.

Hyggja vit so at starvsfólkatalinum, so er danska tænastufyritøkan ISS tann størsta í Norðurlondum við 533.544 starvsfólkum í meira enn 50 londum. Størsta arbeiðsplássið í Norra er “Helse Sør-Øst” við 56.519 starvsfólkum.

Taka vit so allan heimin, tá  liggur Statoil á einum 36. plássi. Danska Mærsk liggur á einum 159. plássi, sambært Forbes.

Sama Statoil er fyristøðufelag, nú borað verður á føroyska landgrunninum fyri 9. ferð. Talan er um brunnin Súla Stelkur, har Dong og Omv eisini eru við. Úrslitið av boringini fyriliggur í september skilst.